## DAGSINS MEINING

# Má ikki gleppa av honum

Landsstýrið hevur tikið undir við Vinnumálastýrinum um ikki at seta 25 milliónir krónur í partapeningi í Smyril Line, nú felagið skal smíðja nýggja millumlandaferju.

Grundgevingin hjá landsstýrinum er fyrst og fremst, at setir landsstýrið pening í Smyril Line, sum eisini siglir við farmi, so er landsstýrið við til at avlaga kappingina, tá hugsað verður um onnur farmaflutningsfeløg.

Hesa grundgeving kunnu óivað tey flestu góðtaka. Men landsstýrið leggur ikki dent á tann stóra týdningin, siglingin hjá Norrønu hevur fyri ferðavinnuna í Føroyum, Íslandi og kanska eisini í Hetlandi.

Vit hava nú í fleiri ár hoyrt ferð eftir ferð, at vit mugu hava meiri enn eina vinnu - fiskivinnuna - at dúva uppá. Og tað er greitt, at ferðavinnan kann verða við til at fjøltátta føroyska búskapin.

Seinastu árini eru eisini gjørdar nógvar íløgur í ferðavinnuna. Ferðaráðið hevur fingið meiri pening at arbeiða við, og alt fleiri smærri fyritøkur royna seg innan ferðavinnuna.

Tí kann tað tykjast løgið, at landsstýrið ikki tekur spurningin, um hvønn týdning Norröna hevur fyri ferðavinnuna við í seinastu grundgevingarnar í notatinum, sum Vinnumálastýrið gjørdi.

Norrøna hevur fyrst og fremst týdning fyri ferðavinnuna sum norðuratlants-sambandið, og í hesum sambandi er eydnast at byggja upp eitt føroyskt felag við gistingarhúsi og øðrum fasilitetum.

Hetta aktiv má ikki gleppa føroyingum av hondum, nú tað ljóðar, at tað er ikki vist, hvussu verður við tí nýggju Norrønu, um Smyril Line ikki fær nóg mikið av peningi.

Landsstýrið vísir til Framtaksgrunnin, men 25 milliónir úr honum er ikki nóg mikið, og heldur ikki nóg mikið at tryggja føroyingum meirilutan av eginpeninginum.

Spurningurin er so, um ikki onkur flokkur á Løgtingi átti at skotið upp, at landskassin setti pening í Smyril Line. Hóast tað ikki er rætt at stuðla einum farmaflutningsfelag, so er tað rætt, at tað almenna hjálpir til at skapa kapitalgrundarlag undir Norrönu, um verkætlanin annars er burðardygg.

**Sosialurin**

## NØVN Í VIKUNI

**Sverri Egholm, fyrrv. landsbókavørður 31/8-1930 – 24/1-2001**



Tað var sum at hoyra eina bók detta av einari hill, tá ið boðini komu fyrramorgunin um at Sverri Egholm, fyrrverandi landsbókavørður, so brádliga var farin. Hesin hvølli bresturin, sum viðhvørt hoyrist inni á einum annars so friðarligum bókasavni, hekk hesa ferðina longur í luftini enn vanligt. Tað tóktist, sum vindeygu, veggir, loft og hillar vildu tala, men tey fingu ikki rættiliga orðið fyri seg.

Sverri tók prógv sum bókavørður í 1955, í einari tíð, tá ið tað ikki vóru nógvir føroyingar, ið valdu sær hetta starvið sum lívsyrki, og tí kundi tað kanska, serliga tá ið tíðini, kennast heldur einsamalt at arbeiða í hesum yrkinum. Hann starvaðist á Landsbókasavninum í tveimum tíðarskeiðum 1955-1963 sum bókavørður og frá 1968-1989 sum landsbókavørður.

Tað er einki at ivast í, at høvuðsverkið hjá Sverra á bókasavnsøkinum var byggingin av nýggja Landsbókasavninum seinnapartin í sjeytiárunum. Her legði hann alla sín sál, og meira aftrat í, tí hann vildi skapa ein virðiligan karm um ta føroysku bókaognina. Og hetta eydnaðist.

Sverri var ein óførur brævskrivari. Hann kundi gleða mangan mannin við tí skrivaða orðinum. Eg kundi tikið nógv dømi fram um hetta, men skal halda meg til tað eina:

Fyri skjótt tríati árum síðan skrivaði Sverri fyri Landsbókasavnið bræv til mann á bygd. Sum øll hansara brøv, so var heldur ikki her talan um nakað standard skriv, men eitt persónligt bræv við tignarligari byrjan, viðkomandi innihaldi og einum bjartskygdum enda, alt virðiligt og í navni stovnsins. Brævmóttakarin gav sær góðar stundir at umhugsa nevnda bræv og alt málið sum so, og nú fyri stuttari tíð síðan kom svarið. Í endanum av svarinum skoytti brævmóttakarin uppí: Heilsa Sverra Egholm og takka honum fyri áhugan í sínari tíð.

Tað er ikki meira enn ein góð vika síðan, at Sverri var inni á gólvinum á Landsbókasavninum, og eg fekk mint hann á brævið frá 1972, og borið honum heilsanina. Eg helt meg síggja í eygnakrókunum, at hann hugsaði sum so: so var tað brævið ikki skriva til fánýtis, meðni. Men hann segði einki. Smíltist eitt sindur. Jú, hann mintist brævið.

Sjálvur kom eg at kenna Sverra í 1973, tá ið eg arbeiddi eitt ár á Landsbókasavninum. Síðan tá hava gøtur okkara mangan krossast, og altíð hevur tað verið tað skrivaða orðið, ið, á ein ella annan hátt, bant okkum saman. - Eisini nú henda dagin, tá ið vit hittust fyri seinastu ferð, og eg bar honum heilsanina frá Rikardi Danielsen og segði honum, at nú var handritið til bíbliutýðingina hjá Victor Danielsen komið í húsið.

Við hesum fáu orðum vil eg siga Sverra Egholm tøkk fyri tað, hann útinti til frama fyri ta føroysku bókina, og tað, hann gjørdi fyri at lívga um føroyska bókasavnsheimin, ið ikki altíð hevur verið mettur at hava so øgiliga átrokandi ábøtur fyri neyðini. Sverrasa partur lá ikki eftir.

Friður verið við minninum um Sverra Egholm.

**Martin Næs**



*Bergur Hanusson, djóralækni*



*Heri Joensen, prestur*



*Heri Kragesteen, sálarfrøðingur*



*Ingi Højgaard, løgfrøðingur*



*Jens Andreassen, lækni*



*Jóhanna á Tjaldrafløtti, føðslu/húsarhaldsfrøðingur*



*Jón Klein Olsen, politistur*



*Jón Kragesteen. Ferðslutrygd*

## Spyrjið serfrøðingarnar

Adressan:
Sosialurin,
box 76,
110 Tórshavn,

Fax 314720
ella teldupost:
spyr@sosialurin.fo

– og merkið, hvørjum tit seta spurningum.

**Svarini verða prentað í blaðnum mikudag**



*Julianna Næs, pedagogur*



*Sjúrður Johannesen, sosialráðgevi*



*Turid Thomsen, lestrarvegleiðari*



*Marius Staksberg, málfrøðingur*


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Marjun Dalsgaard marjun@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
John Johannessen john@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo

**Mentan:**
Birgir Kruse birgir@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo

**Útgevari/uppseting:**
Sp/f Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]



**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254mm breið og 346mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.




# Eini hús fyri 650.000 krónur




*Tað er ikki hvønndagskostur, at hús fara trillandi eftir vegnum*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Leygarkvøldið, eftir midnátt, vóru eini hús flutt av Tinghúsvegnum og út á Hamaran á Argjum. Brynleif Hansen gjørdi kvetti, tá hann bjóðaði 5000 krónur fyri húsini, sum skuldu takast niður. Við grundstykki og ístandsetan standa húsini honum í 650.000 krónum.**

FLYTING
*Jústinus Leivsson Eidesgaard*

Jú, tað loysir seg, hevur tú eyga fyri gomlum lutum og dugir at síggja um nytta kann fáast burtur úr. Húsini hjá Brynleif Hansen á Hamaranum á Argjum kosta honum 650.000 krónur við grundstykki. Húsini í grannalagnum fara ikki undir eina millión, fleiri langt yvir. Brynleif fær eini hús, við einari samlaðari gólvvídd uppá 108 fermetur og teir eru allir innrættaðir.

Men spenningur var í luftini, tá húsini skuldu flytast leygarkvøldið. Teir hava í fleiri dagar bíðað eftir líkindum, og nú var so til. Húsini skuldu fyrst flytast yvir um parkeringsøkið við SMS. Síðan eftir R.C effersøesgøti niðan á Ringvegin, allan vegin út eftir Marknagilsvegnum , oman við Kirkjugarðinum. Úteftir Jákup Dahlsgøtu, yvir um brúnna við Sandá og síðan niðan á Hamaran.

– Tað gekk ótrúliga væl. Men tað vóru eisini dugnalig fólk, sum stóðu aftan fyri flytingina. Bilurin og sjafførur hjá Júst Sivertsen førdu húsini trygt út á Hamaran. Kranarnir hjá Skipasmiðjuni lyftu húsini professionelt og Asbjørn Matthisen, timburmeistari gjørdi dygdararbeiði í sambandi við flytingina, sigur Brynleif Hansen.

– Tað var bara í einum petti, at tað var eitt sindur vandamikið. Tað var, tá vit skuldu undir háspenningslinjurnar, har Varðagøta gongur niðan í Ringvegin. Men eisini her var fólk, sum dugdi sítt arbeiði. Um húsini skuldu koppað, so høvdu vit smíðað stuðlar undir húsini, tó ongantíð var vandi á ferð, sigur Brynleif Hansen.

# Karl Johansen afturvaldur



Leygardagin hevði Havnar Arbeiðsmannafelag aðalfund. Áðrenn fundin var tað longu greitt, at karl Johansen fór at verða afturvaldur til formann. Valevni til formann skuldi verða latin felagnum í seinasta lagi 1. januar, men onki uppskot kom inn, so Karl Johansen var einsamalt valevni.

Annars stóðu tveir nevndarlimir fyri vali, Eybjørn Jacobsen og Róland Næss Joensen. Eyðbjørn Jacobsen varð afturvaldur, men Jóhan Karl Dam varð valdur ístaðin fyri Róland.

# Lastbilur koppaði

**Ein lastbilur, sum koyrdi grót úr undirsjóvartunlinum, fór útav vegnum í Kollafjarðardali. Annars vóru fleiri ferðsluóhapp um vikuskiftið, men tað er orsakað av hálkuni, og nógvir bilar vórðu kannaðir**

LØGREGLUTÍÐINDI
*Stefan í Skorini*

Ein lasbilur, ið varð lastaður við gróti úr undirsjóvartunlinum, fór útav á vegnum millum Statoil-støðina og rundkoyringina í Kollafjarðardali. Bilurin var komin ov langt út í vegjaðaran, sum smokkaði undir tí tunga bilinum. Lastbilurin var á veg suðureftir móti Kollafirði fríggjamorgunin.

Annars sigur løgreglan, at tíggju ferðsluóhapp vóru um vikuskiftið, men tó stóðst eingin mansskaði av hesum óhappum. Hált hevur verið um alt landið, og tað hevur gjørt sítt til, at bilførarar ikki klárað at hava tamarhald á bilinum.

Løgreglan hevur kannað nógvar bilar seinastu dagarnar, og ein førari varð tikin fyri spirituskoyring.

Trý smærri herverk vóru eisini, men tó einki álvarsamt



*Hesin lastbilurin fór út av vegnum fríggjamorgunin. Hann var á veg til Kollafjarðar við gróti úr undirsjóvartunlinum*

*Mynd: Jens K. Vang*